

## Stór konsert í Norðurlandahúsinum

Í kvøld verður stór konsert við Lindu Andrews í Norðurlandahúsinum saman við vælumtóktum føroyskum kóri. Hetta verður fyrsta veruliga konsertin við Lindu Andrews í Føroyum, síðani hon vann X-Factor finaluna. Konsertin verður í Norðurlandahúsinum í kvøld kl 20, og fyrireikarar siga, at fá atgongumerki eru eftir. Tað er kóri, sum Eirikur Skála stovnaði í sambandi við, at Andre Crouch hevði konsert í Føroyum, sum fer at syngja. Kórið hevur verið virkið síðani. Kórið hevur eitt nú vitjað í Danmark, Svøríki og Álandi, og hevur sungið saman við Jessi Dixon tvær ferðir, og hevði konsert saman við Ron Kennoly í desember 2007. Kórleidari er tann so vælkenda songkvinnan, Sigrið Rasmussen.

# Anfinn Kallsberg meldar kríggj

**Tað er nasadjarvt av Anfinni Kallsberg at krevja, at vit skulu ikki hava lønarhækkingar í næstum. Tað kemur ikki upp á tal at vit frásiga okkum lønarhækkingar. Anfinn Kallsberg kann byrja við at skerja hjá sær sjálvum og hinum politikarunum, sigur Ingeborg Vinther**



*Anfinn Kallsberg skal bara passa sítt og lata vera við at hótta fakfeløgini, tí tað kemur ikki upp á tal at vit frásiga okkum nakra lønarhækking, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag*

LØNARSTEÐGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

"- Sikken ein frekkheit.",

Tað var tað fyrsta, Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, hugsaði, tá ið hon las samrøðuna, sum Sosialurin hevði við Anfinn Kallsberg í fyrradagin.

Ingeborg Vinther heldur, at tað er ikki sørt nasadjarvt av formanninum í fíggjarnevndini, at krevja, at løntakarin skal frásiga sær allar lønarhækkingar ta næstu tíðina.

- Tað kemur ikki upp á tal, at vit frásiga okkum lønarhækkingarnar, sum vit skulu hava nú fyrsta mai og hvat samráðingarnar næsta ár, hava at bjóða, fái eg onki sagt um enn.

Og ætlar Anfinn Kallsberg at strika lønarhækkingar og at taka samráðingarnar frá okkum við lóg, vil eg fegin síggja, teir politikarar, sum tora at atkvøða fyri slíkum.

- Leypa teir á fakfeløgini, kunnu teir vænta rok á arbeiðsmarknaðinum, tí ongin ivi er um, at øll fakfeløgini fara á barrikadurnar.

Men tað gjørdu teir í nítiárunum?

Ja, men tað fara fakfeløgini ikki at góðtaka einaferð afturat. Fakfeløgini, og serliga tey tímaløntu, hava altíð víst samfelagssinni og hava hildið aftur við lønarkrøvum. Í 10 ár fingu vit eina lønarhækking upp á 64 oyru tilsamans og aftur nú fyri fýra, fimm árum síðani síðani, sleptu vit allari lønarhækking fyri at fáa gongd á eftirlønina.

- Og vit hava ikki ráð til at missa lønarhækkingarnar, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

### Byrja við sær sjálvum

Ingeborg Vinther heldur, at skal talan verða um lønarsteðg, eiga politikararnir sjálvir at ganga undan sum góð fyridømi.

- Teir kunnu hóskandi byrja við at strika teir skattafríar ágóðar teir sjálvir hava við tað, at teir fáa pengar fyri ferðing og uppihald og annað.

- Men lat teir so harafturat fyrst lækka sína egnu løn niður á sama støði, sum vanligir løntakarar.

- Harafturat fáa politikarar eisini fulla pensjón eftir at hava sitið á tingi ella í landsstýrinum í einans átta ár, samstundis sum vanligi løntakarin skal arbeiða í 30 ár, fyri at fáa somu sømdir.

- Samstundis skulu vit betala okkara egnu pensjón.

Hetta eru krøv, sum eru áløgd okkum av politikarunum. Og samstundis, sum vit skulu betala okkara egnu pensjón, skulu vit betala teirra afturat.

Ingeborg Vinther sigur, at politikarar kunnu ikki krevja meiri av vanliga løntakaranum enn teir krevja av sær sjálvum.

### Ligið sjóvarfallið av sær

Hon fýlist eisini á, at politikararnir hava ligið sjóvarfallið av sær og hava latið kreppuna fingið fastatøkur á samfelagnum.

- Vit hava vitað av hesi kreppuni í eitt heilt ár, men onki er gjørt fyri at byrgja upp fyri avleiðingunum, sigur hon.

Hon nevnir sum dømi um hetta, at vit hava nógv fólk, sum njóta allar tænastur í samfelagnum uttan at betala skatt, ella hava avmarkaða skattskyldug.

Hon vil ikki nevna hvørji fólk, hon sipar til. Tað, sum hevur verið mest frammi, er sjómannafrádrátturin, men Ingeborg Vinther fer ikki at siga, at hann skal burtur.

Hon átalar at politikararnir ikki vilja nerta seg sjálvar, samstundis sum teir hava gjørt ógvuslig inntriv í gerandisdagin hjá teimum veiku, teimum gomlu og teimum sjúku.

Harafturat hava teir sett stórar skattalættar í gildi til tey, sum hava góðar lønir, ímeðan tey lágløntu merktu lítið og onki.

- Og nú leggjast teir eftir teimum tímaløntu.

### Lønin er lækkað

Ingeborg Vinter sigur, at seinastu árini eru prísirnir hækkaðir nógv meiri enn lønin er hækkað og tað merkir, at keypiorkan er minkað.

- Vit hava fleiri ferðir heitt á politikarar um at lækka mvg á frukt, grønmeti, mjólk og øðrum heilsugóðum mati, men tað hevur verið talað fyri deyvum oyrum.

- Tað skuldu teir gjørt, samstundis sum teir settu avgjaldið upp á ósunnum mati og góðgæti, sum eg onki havi ímóti.

- Oljuavgjaldið er heldur ikki lækkað, sum vit hava biðið teir um at gera fyri at lætta um.

Ingeborg Vinther vísir eisini á, at tá ið oljan hækkaði, varð tað brúkt sum páskot fyri at hækka prísin á alskyns matvørum rættiliga nógv.

- Nú er oljan blivin blivin bíligari aftur, men eg havi so ikki lagt merki til, at prísurin á matvørum er lækkaður aftur, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

## Strika allar lønarhækking

Í samrøðuni við Sosialin fyrradagin, sum Ingeborg Vinther sipar til í hinari greinini her á síðuni, staðfesti Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, at tað einasta rætta er at strika allar lønarhækkingar fyri at avmarka arbeiðsloysið sum minst.

Hann staðfesti, at almennu útreiðslurnar skulu ikki hækka eina krónu næsta ár.

Men eftir sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, skal lønin hækka trý prosent heyst.

Verður alt annað óbroytt, merkir tað, at tað almenna skal spara minst trý prosent næsta ár og tað fer uttan iva at føra til uppsagnir.

Og Anfinn Kallsberg heldur, at eisini privati arbeiðsmarknaðurin eigur at sleppa øllum lønarhækkingum fyri at varðveita sum flest størv og fyri at vísa samhaldsfesti við tey alment løntu.

Anfinn Kallsberg er eisini til reiðar at gera tað við lóg, verður tað neyðugt.